Skeið á Tjóðpallinum:

# Krevur teknikk at vera nátúrlig



Ria Tórgarð á rannsóknarferð við røddini sum amboð

**Tað krevur harða venjing at uppføra seg nátúrligt á palli, og eitt tað týdningarmesta amboðið er røddin. Um dagarnar fáa leikarar venjing á Tjóðpalli Føroya frá ensku, Nadine George, sum hevur ment sín egna teknikk í at venja røddina**

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*

– Hetta ger okkum stutt sagt til betri sjónleikarar. Og so løgið tað ljóðar, gevur neyvi teknikkurin eitt ótrúligt frælsi til at fáa leikin so nátúrligan, sum gjørligt, siga tær báðar Katarina Nolsø og Ria Torgarð, sum saman við átta øðrum leikarum í løtuni eru til røddarvenjing á Tjóðpalli Føroya. Tað er enska Nadine George, sum hevur ment sín heilt serstaka teknikk í at brúka røddina rætt á palli, sum eisini stendur fyri venjingunum.

## Røddin – lykil til kenslurnar

Tekstirnir, leikararnir brúka til venjingarnar, eru úr sjónleikum hjá William Shakespeare, og tað er ikki uttan orsøk. Nadine George greiðir frá, at ikki minst tí Shakespeare sjálvur var sjónleikari, hava hesir tekstirnir alt, sum skal til, tá tað ræður um at venja andadrátt, støðgir og javnvágina millum ljóðini. Sum kunnugt eru sterkar kenslur altíð uppá spæl hjá Shakespeare, og tað eru tær eisini hesa løtuna á gamla Meiarínum. Á pallinum anda og sveitta Ria Torgarð og Páll Danielsen seg ígjøgnum endaleysar endurtøkur av somu setningum, inn til Nadine umsíður er nøgd. Excellent, very good!, ljóðar skoðsmálið, meðan Nadine leitar eftir næsta tekstbrotinum, sum skal venjast.

Teknikkurin gongur í stuttum út uppá, at við at venja og brúka røddina á ein ávísan hátt, ber tað til hjá leikarnum at mana fram júst tær kenslur, sum leikluturin ella replikkin krevur. Venjingarnar á Tjóðpallinum beint nú eru úrslit av drúgvari gransking í sambandinum millum rødd og kenslur, sum Nadine hevur ment til ein teknikk, tað ber til at læra og brúka umaftur við øllum tekstum á øllum málum.

– Ein leikari, sum letur tilvildina ráða og vónar tað besta, verður ongantíð ein góður sjónleikari. Í grundini er hann als ikki sjónleikari, tí sjónleikur snýr seg um at hava tamarhald á sær sjálvum, vita hví tú gert, tað tú gert og duga at endurtaka tað til ein og hvørja tíð. Heimsins størstu filmar, høvdu aldrin verið gjørdir, var tað ikki fyri leikarar, sum eftir fáum sekundum megna at lukka av fyri øllum øðrum og savna seg um teknikkin, sum krevst, sigur Nadine og avlívar allar mytir um hjartanemandi spontanan sjónleik, sum kemur »av sær sjálvum«.

– Tú lærir sjálvandi ikki alt beinanvegin, men okkurt hongur altíð við, sum tú kanst byggja víðari á, so tú allatíðina mennist sum leikari, sigur Katarina.

– Tað ljóðar kanska eitt sindur øvut, men í grundini er tað teknikkurin, sum ber hugflogið, so tú eisini ført brúkt teg sjálvan uppá aðrar mátar á pallinum. Skalt tú spæla sannførandi sjónleik, mást tú kenna teg tryggan við amboðini, tú hevur at brúka. Tástani ført tú frælsi til at vera náturlig á pallinum, sigur Ria, sum letur væl at Nadine, sum venjara. Eisini Nadine er væl nøgd við arbeiðið, leikarnir leggja í venjingarnar.

– Tað er ein fragd at venja hesar leikarnar. Tey eru ótrúliga tilvitað um, hvat tað er, eg royni at fáa fram í teimum og vísa stóran opinleika, sjálvt um vit allatíðina eru á markinum til tað ótilvitaða og eitt sindur óhugnaliga. Og tað krevur áræði, sigur Nadine George.

## Broytast sum leikarar

Hetta er fjóðru ferð, Nadine er í Føroyum og hevur venjingar, og Ria Tórgarð er sannførd um, at hetta hevur givið úrslit.

– Summir av leikarnum hava verið við á fleiri av skeiðunum, og tað er heilt týðiligt, at tey eru broytt sum leikarar. Eg havi sjálvi verið við hvørja ferð, og eg merki væl, hvussu eg flyti meg víðari sum leikari, sigur Ria, og Katarina Nolsø nikkar



*Nadine George, sum stendur fyri røddarvenjingunum á Tjóðpallinum hevur ment sín heilt serstaka teknikk í at nýta røddina á palli*



*Tey fylgja væl við meðan hinir leikarnir venja á pallinum*